SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

# Ársrit

## Ársfrágreiðing 2015

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

# Innihaldsyvirlit

Stjórin skrivar ... 3
Nýggj sjóvinnubrøv ... 5
Merkið klintrar upp eftir hvítalista ... 6
FAS ... 8
Føroyska Skipaskráin ... 10
Talgildar skrásetingar ... 12
Smábátar ... 13
Færri og færri fiskiskip ... 14
Uppgávur og ábyrgd ... 15

Ábyrgd: Sjóvinnustýrið
Sniðgeving og prent: Prenta
Lagt til rættis: Press



Hans Johannes á Brúgv,
*forstjóri*

# Stjórans frágreiðing

Fremsta uppgávan hjá Sjóvinnustýrinum er støðugt at betra um trygdina á sjónum, verja umhvørvið og at tryggja rættindini hjá viðskiftafólki okkara. Arbeiðið at náa hesum endamáli er skipað í einum avrikssáttmála við Uttanríkis- og Vinnumálaráðið, sum verður endurnýggjaður ár undan ári. Í hesum ársriti vilja vit greiða frá virksemi okkara í 2015, sum m.a. hevur fevnt um niðanfyristandandi átøk.

Í sambandi við at STCW sáttmálin frá Manila 2010 kemur í gildi 1. januar í 2017, var neyðugt at broyta manningarlógina og lýsa nýggja kunngerð um sjóvinnubrøv og førleikakrøv til manning við skipum samsvarandi hesum reglum. Hetta hevði við sær, at allir føroyskir yvirmenn við prógvi frá áðrenn 2006 skuldu á skeið. Broytingin í lógini hevur samstundis við sær, at umleið 3000 føroyingar skulu endurnýggja sær sjóvinnubrøvini. Sjóvinnustýrið kunnar so við og við um broytingina og hevur brynjað seg til uppgávuna.

Í 2014 og 2015 varð eftirlit við trygdarvenjingum um borð á føroyskum fiskiskipum raðfest. Eftirlitsfólk hjá Sjóvinnustýrinum vóru um borð á 56 skipum og gjørdu venjingar hetta tíðarskeiðið. Eisini eftirlit við ali- og brunnbátum varð raðfest í 2015.

Í apríl varð avtala gjørd við Den Maritime Havarikommission, Danmark  um at teir gera kanningar og skriva skaðafrágreiðing, tá talan er um skipbrot, størri eldskaðar og um persónur doyr. Sjóvinnustýrið heldur fram við arbeiðinum at kanna aðrar skaðar og at skriva frágreiðing um hesar.

Eftir mikið kjak hvørt mynstirngareftirlit er ábyrgd hjá Vørn ella Sjóvinnustýrinum tók løgmansskrivstovan í vár avgerð um, at mynstringareftirlitið er ábyrgd hjá Sjóvinnustýrinum.

Umframt eftirlit við mynstringum á skriviborðinum verða trygdarkanningar gjørdar í samstarvi við Vørn og Arktisk kommando sum javnan ger kanningar umborð á skipum í føroyskum sjóøki. Harafturat koma trygdarkanningarnar, sum Sjóvinnustýrið ger við bryggju. Kanningarnar hjá Sjóvinnustýrinum fevna um trettan ymisk øki. Kannað verður millum annað, um siglingarloyvið er í lagi, um trygdarútgerðin verður hildin við líka og undir skipaðum treytum. Kannað verður eisini, um mánaðarligar trygdarvenjingar verða gjørdar umborð og líknandi.

Eisini hevur Sjóvinnustýrið gjøgnum 2015 góðkent undirveitarar í samband við ISO góðskustýring. Víst verður til lista á heimasíðu okkara. Javnstøðuavtala við Danmark, sum javnsetur føroysk sjóvinnubrøv og onnur prógv við donsk, er dagførd og nýggja avtalan verður undirskrivað á vári 2016.

Eftir langa viðgerð varð málið viðvíkjandi garnaskipinum Anitu beint til fútan í november mánaði.

Gamla sjóvinnubrævaskipanin er ikki nútíðarhóskandi. Tí hevur Sjóvinnustýrið keypt nýggja skipan. Nýggja skipanin er ein web-skipan, har umsøkjarin avgreiðir sína umsókn á alnótini. Skipanin verður klár at taka í brúk á sumri 2016.

Sjóvinnustýrið fylgir dagliga við øllum skipum soleiðis at mistøk ikki verða gjørd, sum gera at, skipini verða afturhildin. Tó vórðu tvey skip í FAS skipaskránni afturhildin 2015. Hetta er sera óheppið og kann fáa ávirkan á okkara EF tal, sum er mát hjá hvíta lista hjá Paris MoU. Flaggið fellur tó ikki av hvíta lista.

Sum eitt lið í átakinum at fáa flaggið longur upp á hvíta lista hjá ParisMoU kjósar Sjóvinnustýrið hvørt ár ársins skip. Í 2015 varð ársins skip M/V NORTHERN OCEAN.

**SJÓVINNUSTÝRIÐ HÚSAST Í TÓRSHAVN OG Í MIÐVÁGI**

**Tórshavn** umsitur skipaskráseting og marknaðarføring av FAS - 4 fólk
**Miðvágur** umsitur skipaeftirlit og manningarviðurskifti - 16 fólk

Í apríl og í november fóru eftirlitsmenn um borð á skip í FAS fyri at fremja eyka eftirlit. Hetta átak er ein liður í arbeiðinum at verja flaggið og samstundis koma longur upp á hvíta lista hjá Paris MoU.

Flagg okkara er framvegis skírt hentleikaflagg av ITF (International Transport Federation). Sjóvinnustýrið hevur ikki samráðingarrætt við ITF men hevur samskift við FMU (Faroese Maritime Union) um hesi viðurskifti. Samráðingar innanhýsis í ITF, herundir FMU, eru farnar í gongd í vár. Sjóvinnustýrið veitir í hesum sambandi FMU neyðugar upplýsingar um skipaskránna, lóggávu v.m. Niðurstøða kemur vónandi í summar.

Stevnumiðið hjá Sjóvinnustýrinum er at vera ein viðurkend og virkin maritim umsiting, ið veitir dygdargóðar tænastur til sjóvinnu, landsins myndugleikar og Føroya fólk. Við átøkunum í 2015 og framhaldandi virkseminum fremja vit hetta í verki.

**FAS**

Síðan Føroyska Altjóða Skipaskráin varð sett á stovn í 1992, hevur ein støðug tilgongd av skipum verið í FAS. Nettotalið av skrásettum skipum er hækkað støðugt seinastu árini, og ætlanin er, at fáa talið at vaksa enn meira.

Orsøkirnar til at fáa FAS at vaksa og vera kappingarført við onnur fløgg eru fleiri. Fyrst og fremst vilja vit varðveita føroysk skip undir føroyskum flaggi. Samstundis vilja vit vera við til at skapa avleitt virksemi við eini blómandi shipping-vinnu, sum er uppløgd í einum samfelag sum okkara. Vit hava vitanina og førleikarnar.

**Fyrimunir fyri reiðarí**

FAS er ein ógvuliga kappingarfør skipan, samanborið við skipanirnar í øðrum norðurlondum. Vit marknaðarføra FAS sum eina lagaliga skrá við lagaligum treytum. Skattastigin er javnur á 35 %, og allur skatturin hjá manningini verður borin aftur til reiðaran umleið 6 dagar eftir, at løn er útgoldin. Ongar sosialar útreiðslur eru fyri skip, sum ikki hava føroyska manning. Føroyska manningin rindar samlað 4,21 % í sosialum útreiðslum og hava tí somu rættindini sum allir føroyingar.

**Avleitt virksemi**

Hóast nærum øll skip í FAS eru útlendsk, so eru feløgini handan skipini føroysk. Hetta er krav í FAS. Sostatt hevur hetta givið møguleikar hjá føroyingum at skapa eina shipping-vinnu á landi við menningarmøguleikum. Í Danmark fekk hendan spírandi vinna heitið “Det Blå Danmark” í síni tíð. Nøkur føroysk feløg bjóða í dag ymsar tænastur til kundar í FAS. Hesi umsita upp til 300 mans og tilrættisleggja mynstringar og ansa eftir skjølum í *Crewing*. Aðrar tænastur, sum hesi feløg kunnu bjóða eru bókhald og roknskapur hjá føroyska felagnum hjá reiðarínum, lønargjaldingar og samskifti við myndugleikarnar. Sostatt er avleitt virksemi í FAS longu ein týðandi vinna í Føroyum. Sambært TAKS vóru 1.474 útlendingar og 689 føroyingar, tilsamans 2163, lønartakarar umvegis FAS skipanina í 2014. Tað vórðu 605 mió. kr. goldnar í FAS lønum í 2014. Smb. kanning frá Hans Ellefsen og Hera á Rógvi, búskaparfrøðingum, 12. mai 2016, er niðurstøðan, at tað almenna fekk góðar 55-60 mió. kr. í eyka inntøku í 2015 orsakað av, at føroyingar hava eina FAS skipan í mun til um eingin var.

**Komandi avleitt virksemi**

Aðrar vinnur, sum seinni kunnu verða tilknýttar FAS, eru keyp og sølu av flutningi (befragting/speditørvirksemi), har feløg skipa fyri at lasta og lossa vegna eigaran. Teknisk umsiting er eisini ein komandi vinna, har føroysk feløg kunnu tryggja reiðarum, at øll altjóða maritim krøv, stór sum smá, verða lokin. Hetta hevur við sær størri og smørri umvælingar/umbyggingar sum m.a. kunnu verða gjørdar á skipasmiðjum í Føroyum.

**Ávirkan á samfelagið**

Ein blómandi shipping-vinna gevur ringvirkningar í samfelagnum. Tænasturnar skapa arbeiðspláss og soleiðis eitt nýtt bein hjá føroyska búskapinum at standa á. Ikki minst er hetta eitt øki, sum føroyskir yvirmenn hava verði brúkarar av í nógv áratíggju. Tí hava føroyingar eina vitan frá brúkarasíðuni, sum er eitt stórt virði fyri vinnuna. Møguleiki er sostatt at skapa arbeiðspláss fyri skipsyvirmenn, sum ynskja at arbeiða á landi.

**Hvat ger Sjóvinnustýrið fyri at betra um grundarlagið hjá FAS**

Arbeitt verður støðugt við at marknaðarføra FAS í útlondum. Í 2015 valdi Sjóvinnustýrið at fokusera á Noreg. Har vitjaði stjórin í FAS og umboð fyri vinnuna fleiri reiðarar í Noregi í fleiri umførum. Eisini var eitt átak við PWC í Bergen, har fleiri reiðarar møttu. FAS gjørdi eina ráðgevaraavtalu við ein norðmann, sum hevur praktiskar royndir í vinnuni, at Marknaðarføra FAS. Harumframt hevði FAS ein bás á Donsø Shippping Meet, har tosað varð við fleiri skipaeigarar.

# 1. januar 2017 – ein broytingartíð

Nógvar broytingar henda í løtuni tá talan er um sjóvinnubrøv og førleikaprógv til føroysk sjófólk. Nýggj kunngerð viðvíkjandi sjóvinnubrøvum og førleikakrøvum til manning við skipum varð lýst tann 5. august 2015. Í hesum sambandi er Sjóvinnustýrið farið undir at útskriva sjóvinnubrøv og førleikaprógv til skipselektrikarar og førleikaprógv til fulltiknar dekkarar. Umframt at tað nú verða útskrivað nýggj sjóvinnubrøv og førleikaprógv, skulu allir navigatørar við handilsskipum og maskinfólk sum heild hava sjóvinnubrøv sambært STCW 2010. Hetta hevur ført við sær, at talið av umsóknum er fleirfaldað. Hetta hevur gjørt, at Sjóvinnustýrið alment hevur heitt á sjófólk um at søkja um sjóvinnubrøv og førleikaprógv í góðari tíð, soleiðis at skiftið fram til 1. januar 2017 verður so smidligt sum gjørligt. Av tí at talan er um eina skiftistíð fram til 1. januar 2017, heitir Sjóvinnustýrið á sjófólk um at kunna seg inni á heimasíðu okkara www.fma.fo. Ymisk viðurskifti kunnu gera seg galdandi, tá talan er um eina skiftistíð fram til 1. januar 2017. Sjófólk eru eisini altíð vælkomin at seta seg í samband við Sjóvinnustýrið bæði umvegis teldupost og telefon. Frá 1. januar 2017 verða sjóvinnubrøv útskrivað til skipskokkar bæði við handilsskipum og fiskiskipum.

Sjóvinnustýrið arbeiðir við einari nýggjari sjóvinnubrævaskipan sum fer at hava við sær, at sjófólk í framtíðini koma at søkja um sjóvinnubrøv og førleikaprógv gjøgnum eina talgilda skipan. Hendan skipan kemur eisini at umfata umsóknir um loðs og viðurkenningarprógv. Eisini verður arbeitt við einari nýggjari heimasíðu. Vónandi fer hetta at lætta um hjá sjófólki.






# Merkið klintraði upp eftir hvítalista

Eitt týðandi mát fyri umdømið hjá eini sjóvinnutjóð er, hvar tjóðin er at finna á sonevndu flagglistunum.

Tað er felagsskapurin Paris Memorandum of Understanding, vanliga nevnd Paris MoU, sum flokkar allar sjóvinnutjóðir, sum sigla í Evropa og í Norðuratlantshavinum á sonevnda flagglistanum – hvíta, gráa og svarta. Samsvarandi listar eru fyri Asia (Tokyi MoU) og Norðuramerika (USCG).

Tá flestu skipini í FAS skipanini sigla í Evropa ella Norðuratlantshavinum, er tað Paris MoU-listin, sum er tann áhugaverdi.

Í yvirlitinum fyri 2014, sum varð almannakunngjørt 1. juli 2015, vóru Føroyar at finna á 26. plássi á Paris MoU-listanum. Tað er á hvítalista, har Føroyar hava verið síðani 2011. Í uppgerðini vóru Føroyar klintraðar av 38. plássi upp á 26. pláss.

Paris MoU stendur við jøvnum millumbilum fyri kanningum av handilsskipum, tá tey koma í útlendska havn. Í 2014 vórðu 252 kanningar gjørdar av skipum í FAS. Kanningarnar fevna um altjóða trygdarkrøv, umhvørviskrøv og arbeiðsviðurskifti hjá manningunum umborð. Paris MoU kunnger árliga hagtøl fyri sjóvinnutjóðirnar.

## Gongdin hjá Merkinum á flagglistanum hjá Paris MoU 2004-2014




Eftir einum torskildum frymli fær hvør sjóvinnutjóð eitt vísital. Liggur vísitali undir 0 er flaggið á hvítalista, er tað millum 0 og 1 er flaggið á gráalista og er tað yvir 1, so verður flaggið sett á svartalista.

Á talvuni omanfyri sæst gongdin hjá Merkinum seinastu árini. Síðani 2011 hevur Merkið verið á hvítalista.

| RANK | FLAG | INSPECTIONS 2012-2014 | DETENTIONS 2012-2014 | BLACK TO GREY LIMIT | GREY TO WHITE LIMIT | EXCESS FACTOR |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **WHITE LIST** | | | | | | |
| 1 | France | 278 | 0 | 27 | 12 | -1.92 |
| 2 | Hong Kong, China | 1,709 | 20 | 137 | 102 | -1.77 |
| 3 | Bahamas | 2,308 | 31 | 182 | 141 | -1.74 |
| 4 | Norway | 1,472 | 19 | 120 | 86 | -1.71 |
| 5 | Sweden | 405 | 3 | 37 | 19 | -1.69 |
| 6 | Isle of Man, UK | 731 | 8 | 63 | 39 | -1.68 |
| 7 | Denmark | 1,082 | 14 | 90 | 61 | -1.67 |
| 8 | United Kingdom | 1,369 | 19 | 112 | 80 | -1.66 |
| 9 | United States of America | 235 | 1 | 23 | 10 | -1.64 |
| 10 | Italy | 1,210 | 17 | 100 | 70 | -1.64 |
| 19 | Netherlands | 3,170 | 79 | 246 | 198 | -1.34 |
| 20 | Bermuda, UK | 252 | 3 | 25 | 10 | -1.29 |
| 21 | Malta | 4,369 | 126 | 334 | 278 | -1.22 |
| 22 | Cayman Islands, UK | 357 | 6 | 33 | 17 | -1.22 |
| 23 | Gibraltar, UK | 848 | 20 | 72 | 47 | -1.19 |
| 24 | Croatia | 140 | 1 | 15 | 4 | -1.12 |
| 25 | Cyprus | 1,976 | 69 | 157 | 119 | -0.91 |
| 26 | Faroe Islands, DK | 252 | 5 | 25 | 10 | -0.91 |

Í yvirlitinum hjá Paris MoU sæst, hvussu sjóvinnutjóðirnar eru flokkaðar á flagglistanum. Á listanum sæst millum annað, hvussu nógvar kanningar hava verið gjørdar og hvussu nógv skip hava verið afturhildin. Einki skip úr FAS varð afturhildið í 2014 og munar tað væl, tá ræður um at flyta uppeftir listanum.

ICS, sum er altjóða felagsskapurin hjá reiðarum, ger eisini sín flagglista yvir sjóvinnutjóðir, sum vísir støðuna hjá teimum ymsu tjóðunum.

Her eru merkini sett í bókstavarøð og hvør sjóvinnutjóð er kannað fyri 18 ymisk øki. ICS sigur, at tvey endamál eru við listanum.

Í fyrsta lagi at vísa reiðarum og útgerðarfeløgunum, hvussu støðan hjá teimum ymsu fløggunum er. Í øðrum lagi kunnu reiðarar og útgerðarfeløg brúka listan til at leggja trýst á egnar flaggmyndugleikar at bøta um viðurskiftini. Tað kann vera fyri at verja trygdina á sjónum, at verja havumhvørvið ella arbeiðsviðurskiftini umborð.




Har, ið einki er at finnast at, er kanningarøkið merkt við grønum. Og við reyðum um okkurt er at finnast at. Tó skal mann ikki trúgva blint upp á teir reyðu fýrakantarnar. Í føroyska yvirlitinum eru reyðir fýrakantar í punktunum fyri Tokyo MoU og USCG, men tað kemst av, at ov fá skip úr FAS eru kannaði í teirra havnum.

Reglurnar eru, at um skip undir einum ávísum flaggi er kannaði færri enn 30 ferðir seinastu trý árini, so er flaggið ikki við á listanum.

Bert níggju fløgg av 114 høvdu grønt í øllum 18 kanningarøkjunum.



# FAS er meiri enn ein skipaskráseting

Síðani 2008 er talið á skipum, sum eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini vaksið úr 33 skipum upp í 89 skip. Seinastu fýra árini hevur talið staðið at kalla í stað.

Umframt at vera ein altjóða skráseting við heimstaði í Føroyum, er FAS eisini ein vegur at menna eina føroyska handilsskipavinnu og maritimar tænastur í Føroyum. Við ársenda í 2015 vóru 89 skip skrásett í FAS.

Í kjararvørrinum á FAS-skrásetingunum vaksa nýggjar vinnur fram, sum kunnu geva eitt gott íkast til føroyska samfelagið.

Nýggj arbeiðspláss verða skapt innan fleiri ymisk tænastuøki.

Nevnast kunnu ymisk sløg av tekniskum eftirliti, viðlíkahald, manningartænastur og ymisk sløg av umsitingarligum uppgávum, so sum løgfrøðilig og fíggjarlig ráðgeving.

Stórir møguleikar liggja í øllum teimum uppgávum, sum eru knýttar at skipunum í FAS.

Í løtuni er trupult hjá navigatørum at fáa siglingstíð, men eisini her áttu møguleikar at verið at fingið siglingstíð við skipum undir FAS-skipanini.

FAS varð sett á stovn í 1991 í eini roynd at halda føroysku handilsskipini í flotanum. Í 2008 vórðu broytingar gjørdar, sum so líðandi hava drigið fleiri skip inn í skrásetingina.

Skipini í FAS síggjast eisini í talgildu skipaskrásetingini í teyggjuni. Ætlanin er at víðka skrásetingina, so hon eisini fevnir um slag av skipum. Eitt nú ferðafólkaskip, sleiparar og fraktskip.

## Tal av skipum í FAS síðani 1992



Bruttotonsatalið á skipunum í FAS hevur verið støðugt vaksandi. Síðani 2010 er bruttotonsatalið á skipum í FAS vaksið úr 236.000 bruttotonsum upp í 320.000 tons.

## Bruttotonsatalið (BT) í FAS




Miðalaldururin á skipum í FAS er lækkaður nakað seinnu árini. Men samstundis sigur miðalaldurin, at fleiri skip hava verið nógv í skipanini, tí eitt krav fyri at kunna skráseta eitt skip í FAS er, at skipið er yngri enn 20 ár.

## Miðalaldur fyri skip í FAS




Høvuðspeningarrenslið í sambandinum millum reiðarar, manning og TAKS sæst á hesi myndini:



# Skipaflotin broyttur

Talið á fiskiskipum hevur seinastu mongu árini verið støðugt minkandi.

Samstundis hava fleiri vanlig reiðarí lagt um til frálandavinnuna. Talið á arbeiðsplássum umborð á fiskiskipunum veksur ikki tað stóra, men nýggj arbeiðspláss koma á tí partinum av flotanum, sum kann sigast at vera handilsflotin. Dømi eru eisini um fraktskip og sandskip, sum sigla uttanlands undir føroyskum flaggi.

## Skip í Føroysku Skipaskránni (FS)




Talið á øllum fiskiskipum minkar nakað, men vert er at leggja merki til, at her eru øll fiskiskip yvir 5 BT við, tvs nógvir smábátar, sum telja nógv í hagtølunum.

Um hugt verður eftir tøkum tølunum á fiskiskipum størri enn 20 bruttotons, so sæst, hvussu fiskiskipaflotin er minkaður.

## Tal á føroyskum fiskiskipum 1988-2014




Í dag eru 122 fiskiskip yvir 20 tons skrásett í Føroysku Skipaskránni. Fyri 28 árum síðan vóru 266 fiskiskip yvir 20 tons skrásett í Føroyum. Ein minking upp á 54%.

Nøkur fá nýggj fiskiskip koma í flotan, men tá fara oftast onnur úr flotanum.

Handilsskipini gerast fleiri og fleiri. Síðani 2010 eru tey vaksin úr 113 upp í 136. Men her er vert at leggja til merkis, at til dømis bæði alibátar og sandbátar verða skrásettir sum handilsskip í Føroysku Skipaskránni.

## Miðalaldur í Føroysku Skipaskránni




Miðalaldurin á øllum fiskiskipunum yvir 5 BT er vaksandi. Í 2015 var miðalaldurin 33, 6 ár. Í 2010 var miðalaldurin 29,8 ár.

Handilsskipini eru greitt tey við lægsta miðalaldri. Í 2015 var miðalaldurin 21,6 ár.

Stuttleikaskipini eru ikki so nógv í tali, men eru nógv tey eldstu í skrásetingini. Í 2015 var miðalaldurin 46,5 ár. Sluppirnar og træskipini telja væl í høga miðalaldrinum.

## Bruttotons í miðal í Føroysku Skipaskránni




Nøkur sveiggj hava verið í bruttotonsatalinum í fiskiskipaflotanum. Síðani 2011 er samlaða bruttotonsatalið vaksið úr 68.000 bruttotonsum upp í 84.700 bruttotons. Teir stóru uppsjóvartrolararnir eru umleið 3.500 brutto tons hvør.

Hjá handilsskipunum eru tað millum annað nýggju alibátarnir, sum gera mun í samlaðu bruttotonsatalinum.

## Samlaða skipatalið á sýslur




Av samlaða skipatalinum yvir 5 BT í Føroysku Skipaskránni vóru í 2015 157 skip heimahoyrandi í Eysturoyar sýslu (FD).

# Talgildar skrásetingar

**Teyggjan.fo.** Teyggjan er almenna skrásetingin av øllum føroyskum skipum og bátum, fiskiloyvum og rættindum. Teyggjan er ætlað, sum felagstelduskipan til allar stovnar, sum hava við skip og sjóvinnu at gera.

Higartil ber til at fáa:

- Kunning um skip og bátar, sum eru skrásett/ir undir føroyskum flaggi
- Avmarkaða kunning um útlendsk skip, ið fiska undir Føroyum
- Kunning um fiskiloyvi hjá skipum og bátum, og hvussu hesi fiskiloyvi eru býtt millum bólkar, øki og bátar/skip
- Kunning um ognarviðurskifti hjá skipum og bátum




Fyrstu skrásetingarnar í teyggjuni vórðu gjørdar seinast í 2012. Tey fyrstu tvey árini vóru í miðal umleið 150 vitjandi um dagin. Tal er um serstøk vitjandi, so sami brúkari ikki verður taldur fleiri ferðir.

Í 2015 er talið á vitjandi vaksið upp til millum 200 og 250 serstakar brúkarar í miðal um dagin.

**Sjóvinnubrøv á netinum**

Í 2016 fer Sjóvinnustýrið undir eina nýggja talgilda sjóvinnubrævaskipan. Frá sumri 2016 skulu tey, sum søkja um sjvinnubræv ella søkja um at endurnýggja sjóvinnubræv, gera tað á heimasíðuni hjá Sjóvinnustýrinum.

Fyrstu ferð skal umsøkjarin flyta mynd, heilsuváttan og prógv til heimasíðuna saman við umsóknini. Sum frálíður fara allar upplýsingar um sjóvinnubrøvini hjá tí einstaka at liggja tøkar. Upplýsingarnar verða ikki almennar, men til ber at sleppa fram at teimum við at logga seg inn við serligum brúkaranavni og loyniorði. Á tann hátt ber altíð til at fara inn á heimasíðuna og síggja, hvørjar broytingar hava verið í sjóvinnubrøvunum og øðrum skjølum, eitt nú prógvum og heilsuváttanum.

**Mynstringarskipan**

Sjóvinnustýrið er formligi yvirmynstringarmyndugleikin. Ætlanin er, at mynstringarseðilin skal flytast talgilt í eina felagsskipan, har allar upplýsingar um mynstringina, reiðaríið og skipið eru savnaði.

Orsøkin til, at mynstring ikki kann gerast talgild, er at undirskriftirnar skulu á mynstringarskjalið.



# Skráseting av smábátum

Í mai 2014 samtykti løgtingið nýggja lóg um skráseting av skipum. Í lógini er eisini eitt krav um, at allir smábátar undir 5 BT skulu skrásetast.

Áðrenn lógin varð samtykt var skrásetingin sjálvboðin og næstan helvtin- 40 % - av skrásetingunum vóru skeivar. Í viðmerkingunum til løgtingslógina varð sagt, at "tíðin hevur víst, at nógvir eigarar av smábátum, ið eru skrásettir í farskránni, ikki dagføra upplýsingar um bátin (so sum at hann er seldur, sokkin og skal strikast osfr.), við tí avleiðing, at um tú slært upp í farskránni, so er ilt at siga, um upplýsingarnar eru rættar."

Fyri 1. januar 2015 skrásettu sýslumenn og politistøðir smábátar, men nú er tað Sjóvinnustýrið, sum umsitur alla skráseting.

Higartil eru 2239 smábátar undir 5 BT skrásettir í farskránni. Smábátar verða skrásettir við millum øðrum eigara, bústaði, bátanavni, havnakenningarnummari og kallimerki. Eisini sæst, um báturin hevur góðkent fiskiloyvi, umframt aðrar upplýsingar.

**Aðrar upplýsingar**

| | |
|---|---|
| IMO nummar | Einki ásett |
| Byggiár / skipasmiðja | 1978 / Jógvan Hansen |
| Skrásett fyrstu ferð | 12-10-1981 |
| Byggitilfar | Viður |
| Bruttotons | Einki ásett |
| Nettotons | Einki ásett |
| Bruttoregistartons | Einki ásett |
| Nettoregistartons | Einki ásett |
| Longd | 8,050 metrar |
| Breidd | 2,640 metrar |
| Dýpd | 0,960 metrar |
| Longd yviralt (LOA) | Einki ásett |
| Motorslag | Leyland |
| Motortypur | einki ásett |
| Motororka | 28,00 KW |

Nýggja skrásetingin fer fram í teyggjuni, sum er talgilda skipa- og bátaskrásetingin hjá Sjóvinnustýrinum.

Tørvurin á einari heildardagføring av farskránni hevur verið til staðar í fleiri ár. Við atliti til trygd á sjónum, er eisini tørvur á álítandi skrá, ið kann upplýsa um eigaraviðurskifti hjá øllum smábátum. Nýggja skipanin ger eisini, at tað verður meiri álitandi, hvør eigarin er.

Av núverandi skrásettum smábátum ber til at síggja, í hvørjum sýslum bátarnir eru skrásettir. Í Suðurstreymoy og Eysturoy eru yvir 500 bátar skrásettir.







Eftir upplýsingunum í farskránni er miðalaldurin fyri smábátar 35,5 ár. Tó hava allar skrásetingarnar ikki byggiár við.

Skrásetingin fer fram við oyðiblaði, sum kann takast niður av heimasíðuni hjá Sjóvinnustýrinum.

Kostnaðurin fyri skráseting av smábátum í farskránni er 200 krónur um árið.

# Uppgávur og ábyrgd

Sjóvinnustýrið umsitur og hevur ábyrgd av føroyska regluverkinum, sum ásetur krøv til skip og bátar, skrásettir í føroysku báta- og skipaskrásetingunum. Føroyska regluverkið fevnir um altjóða krøv til skip og bátar, umframt serlig føroysk krøv. Stovnurin leggur áherðslu á at fylgja við í broytingunum í altjóða krøvum og at innføra hesi og serlig føroysk krøv í føroyska regluverkið.

Regluverkið verður kunngjørt á kunngerðarportalinum (kunngerdarportalurin.fo)

Sjóvinnustýrið hevur eisini ein samskipandi leiklut mótvegis øðrum almennum stovnum og áhugabólkum soleiðis, at hesi verða kunnaði um virksemið, sum fer fram í altjóða felagsskapinum IMO

**Skipaeftirlit**
- Eftirlit við at lata byggja og umbyggja skip
- Sýna skip, kanna vanlukkur á sjónum o.a.
- Hava eftirlit við klassafeløgum, sum hava myndugleikagóðkenning at sýna og útgeva loyvisskjøl vegna føroysku myndugleikarnar
- Umsita samskiftið við IMO og aðrar avvarðandi altjóða felagsskapir og stovnar

**Manning**
- Manningaráseting
- Mynstring
- Heilsubøkur, siglingarbøkur og sjóvinnubrøv
- Viðurkenningarprógv
- Loðsprógv og loðsfrítøkuskjøl

**Skipaskráseting**
- Tinglýsing av ognarheimildum, pantirættindum, brúksrættindum og øðrum rættindum
- Skráseting av skipum og vinnuligum førum í felagsdátugrunninum Teyggjuni

**Stevnumið**

Sjóvinnustýrið skal verða ein viðurkend og virkin maritim umsiting, ið veitir dygdargóðar tænastur til sjóvinnuna, til landsins myndugleikar og til Føroya fólk.

**Tí vil Sjóvinnustýrið um fimm ár:**
1. verða ímillum 10 fremstu flaggstatir á hvíta lista hjá Paris MoU
2. hava fleiri enn 200 skip skrásett í FAS
3. varða av einum fiski- og handilsskipaflota, hvørs trygdar og arbeiðsumhvørvi er av teimum bestu í heiminum
4. kunna veita kappingarførar tænastur, sum í stóran mun byggja á sjálvavgreiðslu umvegis alnetið
5. hava kundanøgdsemi, ið er omanfyri miðal
6. verða ímillum bestu arbeiðspláss í Føroyum, har starvsfólk trívast og mennast við spennandi og avbjóðandi arbeiðsuppgávum

**Virðisgrundarlag**

Tað er umráðandi, at virðisgrundarlagið, sum er góðkent av starvsfólkunum, stuðlar undir endamálsorðingini og stevnumiðunum hjá stovninum.

Okkara fimm aðalvirði eru:

**Góðska:** Vit gera tað vit megna, fyri at veita kundum okkara eina dygdargóða tænastu, og um neyðugt taka vit onnur við uppá ráð

**Opinleiki:** Vit samskifta opið og reiðiliga við okkara starvsfelagar og viðskiftafólk

**Álit:** Vit tryggja rættindi hjá viðskiftafólkum og menna skipanir, ið styrkja teirra álit á okkum. Samstundis hava vit álit á okkara starvsfeløgum og virða teirra fakligu førleikar og persónligu eginleikar

**Smidleiki / Fjølbroytni:** Vit fremja nýhugsan og hava jaligan hugburð okkara millum soleiðis, at tænastustøðið støðugt gerst betri og fjølbroyttari

**Trivnaður:** Vit eggja starvsfólkamenning. Tess vegna vilja vit skapa tryggar arbeiðsumstøður og menna spennandi arbeiðsuppgávur, sum stuðla undir sjálvsvirðing og trivnaðin hjá starvsfólkunum

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Sigmundargøta 13 • P.O. Box 1178 • 110 Tórshavn • Faroe Islands • Tel +298 35 15 00 • Fax +298 35 15 05
Inni á Støð 22 • P.O. Box 26 • 375 Miðvágur • Faroe Islands • Tel +298 35 56 00 • Fax +298 35 56 01